# Vágbingar vandamiklir á útivølli

**Í B36 verður staðiliga undirstrikað, at tað verður vandamikið, um uppgávan móti botnliðnum ikki verður tikin í nóg stórum álvara**

B36-VB/SUMBA
*Jóannes Hansen*

B36 er næstfremst og stríðist fyri at vinna FM. VB/Sumba er næstaftast, og tað skal nógv til, áðrenn tað eydnast suðuroyingum at lyfta seg upp um strikuna. Men hóast støðutalvan leggur upp til, at B36 er greiður favorittur, so verður í B36 undirstrikað, at sunnudagsgestirnir í Gundadali eiga ikki at verða undirmettir:

- Um vit skulu hugsa um FM, so er tað einki sum eitur. Vit skulu vinna, men sýna vit ikki rætta hugburðin, so verður tað vandamikið. VB/Sumba hevur fleiri ferðir seinastu tíðina verið á odda, áðrenn teir hava mist, og teir hava víst dygdir á útivølli. Eitt nú megnaðu teir málleysan javnleik síðsta sunnudag, tá ið teir vóru á Sandi, vísir B36 miðvallarin Hanus Thorleifsson á.

Í Vági vóna teir, at okkurt stigið verður í viðførinum suður aftur sunnukvøldið. Men tað verður sera torført:

- Tað er ikki bara sum at siga tað, at spæla í Gundadali ímóti B36. Støðan hjá okkum er ikki góð, og vit hava brúk fyri øllum tí, sum vit kunnu skava saman. Eisini tí sum vit møguliga kunnu vinna í Gundadali. Men tað verður torført, sigur Dan Djurhuus hjá VB/Sumba.

Í B36 minnast teir væl til, hvussu tað gekk, tá ið VB/Sumba í fjør vitjaði í Gundadali. Tá var úrslitið 2-2.



*Eingin ivi er um, at B36 er stórfavorittur, tá VB/Sumba vitjar í Gundadali sunnudagin. Hagtølini eru eisini við B36, tí seinastu 10 árini hevur VB/Sumba bert vunnið á B36 í Gundadali eina ferð.*

*Mynd: Álvur Haraldnsen*

# Tólv mál í tveimum uppgerðum

**KÍ og B71 skjóta nógv mál ímóti hvørjum øðrum, og hesa ferð kunnu fleiri pláss á støðutalvuni standa upp á spæl**

KÍ-B71
*Jóannes Hansen*

Dagin eftir sjómannadagin fáa klaksvíkingar vitjan av sandoyingum. Uppgerðirnar millum hesi bæði feløgini fyrr í ár boða frá, at tað kann gerast málríkt í Klaksvík sunnudagin. Tað endaði 3-3, bæði tá ið B71 var í Klaksvík, og tá ið KÍ var á Sandi.

B71 hevur verið eitt av liðunum, sum hava staðið seg betri enn roknað varð við, og KÍ er eitt av teimum, sum leingi stóð seg illa. Nú er munurin bara eitt stig, og við sigri kunnu bæði feløgini flyta fleiri pláss upp eftir

- Stigatalvan sigur, at liðini eru jøvn, men KÍ er á heimavølli, so teir eru helst favorittar. Serliga tá hugsað verður um, at teir hava fingið fult tvær tær seinastu ferðirnar, sigur spælandi B71 venjarin, Eli Hentze, sum tað tykist líka væl hjá at leggja trýstið á mótstøðumenninar.

- Eftir tveir sigrar á rað, og eftir at tað tvær ferðir hevur eydnast at halda mótstøðumonnunum frá at gera mál, er lagið gott. Spælararnir lukta møguleikan, at tað við sigri hesa ferð ber til at sleppa av 8. plássi. Vit hava spælt tveir 3-3 dystir ímóti teimum í ár, men talan verður ikki um sama úrslit hesa ferð. B71 hevur tó fleiri góðar offensivar spælarar, og tá ið okkara eisini eru framrættaðir, er tað ikki óhugsandi, at talan verður um gott undirhald, heldur KÍ venjarin Eyðun Klakstein.

# Oddaliðini eru favorittur

Um hugt verður eftir úrslitunum hjá formulaliðunum síðstu 10 árini, so er at kalla eingin ivi um, hvørji lið eru favorittar til dystirnar um vikuskiftið. Í átta dystum hevur Skála ongantíð fingið fult við Løkin, og tí er NSÍ stórur favorittur undan dystinum. Eisini B36 má metast sum stórfavorittur í Gundadali móti VB/Sumba. Síðstu 10 árini hevur VB/Sumba bert vunnið ein dyst, ein er endaður javnur, og B36 hevur vunnið níggju ferðir. B71 hevur heldur ongantíð vunnið í Klaksvík, har KÍ hevur vunnið fýra ferðir, meðan ein dystur er javnur. Í einasta dystinum, sum EB/Streymur og AB hava leikt í Streymnesi, vann EB/Streymur fyrr í ár, meðan einasti dysturin, sum kann tykjast spennandi, er dysturin í Gundadali, har GÍ vitjar hjá HB. Har hevur HB tó havt eitt gott tak á gøtumonnum, men síðstu tvær ferðirnar hevur GÍ vunnið. So er spurningurin, hvussu tað fer at enda hesu ferð.

| | 07 | '06 | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-VB/S | - | 2-2 | - | 1-0 | - | 3-1 | 2-1 | 6-0 | 3-2 | 1-2 | 6-1 | 8-2 | 4-0 | 9-1-1 | 36-11 |
| KÍ-B71 | 3-3 | - | - | - | - | - | - | - | 2-0 | 2-1 | 3-1 | - | 5-2 | 4-1-0 | 15-7 |
| NSÍ-Skála | 3-1 | 2-0 | 2-1 | 3-3 | 1-0 | 2-0 | 2-0 | 3-1 | - | - | - | - | - | 7-1-0 | 18-6 |
| EB/S-AB | 3-0 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 3-0 |
| HB-GÍ | 2-3 | 1-2 | - | 4-1 | 3-1 | 3-3 | 2-2 | 3-0 | 2-3 | 5-0 | 2-0 | 3-0 | 2-0 | 7-2-3 | 32-15 |

# AaB spældi illa í Finlandi

**Hvørgin av føroysku landsliðsspælarunum vóru á vøllinum, tá ið AaB í gjár tapti 2-1 í UEFA Cup í Helsingfors**

ÚTISETAR
*Jákup Mørk*

Tað royndist ikki væl, tá ið AaB í gjár spældi í innleiðandi umfarinum til UEFA Cup í finska høvuðsstaðnum Helsingfors. HJK Helsinki vann 2-1, og tað var væl sloppið, verður sagt í AaB leguni.

Nógvir spælarar vóru ikki á tí støðinum, sum tað kann roknast við, verður sagt.

Venjarin, Erik Hamrén, heldur kortini ikki, at úrslitið var so heilt galið, og hann sigur seg rokna við, at tað fer at eydnast at vinna samantalt, tá ið HJK Helsinki um tvær vikur fer at vitja í Aalborg.

Onkrir av AaB spælarunum hava eftir dystin sagt, at tað var teimum til ampa, at tað varð spælt á graslíki og ikki á grasi.

Longu fyrrapartin í dag vandi AaB aftur í Aalborg. Nú fyrireika teir seg til sunnudagin, tá ið OB fer at vitja í Aalborg.

Hvørki Jón Rói Jacobsen ella Súni Olsen vóru á vøllinum hóskvøldið. Tað kann væl vera, at teir aftur sunnudagin fara at sita á beinkinum. Men tá ið tað í gjárkvøldið varð funnist at miðverjuni, sum ikki varð hildin at vera so sannførandi, kann tað hugsast at vera ávísur møguleiki fyri, at Jón Rói Jacobsen fer at fáa boð.